DAGSINS MEINING

Stormur í einum vatnglasi!

Tað, sum frá byrjan varð lagt upp til at blíva einstjórnarkreppa, tykist nú bara at enda sum ein stormur í einum vatnglasi. Skulu vit døma eftir viðmerkingunum hjá løgmanni, júst afturkomin til arbeiðis í Tinganesi. Skuldsetingarnar, ið Tórbjørn Jacobsen herfyri setti fram móti løgmanni og fiskimálaráðharranum, tykjast als ongar avleiðingar at fáa. Løgmaður, ið meira ella minni verður kriminaliseraður av sínum samgongufelaga, vil nú bara hava at vita, um Tjóðveldisflokkurin stuðlar samgonguni. Tann spurningin nýtist hann ikki at seta, tí hann kennir svarið. Bæði formaður og næstformaður Tjóðveldisfloksins hava boðað frá, at útmeldingin hjá Tobba stendur bara fyri hansara egnu rokning. Tað virkar tí sum løgmaður vil leggja ein dempara á málið og helst fáa tað gloymt heldur enn at taka tað við rótina og ábyrgda allan Tjóðveldisflokkin fyri tað. Eingin stjórn nakra staðni hevði góðtikið at sitið við avgerandi atkvøduni frá einum tingmanni, sum setir fram slíkar skuldsetingar móti tveimum av ráðharrunum.

Løgmaður vil so eisini hava at vita, hvat Tórbjørn Jacobsen sipar til, tá hann kemur fram við umrøddu skuldsetingum. Tað veit hann uppá forhond, at hann ikki fær. Og hann fær heldur onga umbering frá tingmanninum. Skal hann tí reinsa seg má hann stevna, og tað er júst tað, sum tingmaðurin ynskir (og møguliga allur Tjóðveldisflokkurin við, sum jú hevur eina "hønu at royta" við løgmann sum takk fyri seinast í miseydnaðui fullveldissøk teirra).

Fyri at koma Tobba uppá forkant er løgmaður snildur og roynir at beina burtur allan iva um eitt ávíst mál, ið hevur verið frammi fyrr. Har gekk alt fyri seg sum tað átti er útmeldingin frá løgmanni. Er tað so, og hevur hann reint mjøl í posanum í øllum øðrum, so er væl einki til hindurs fyri at stevna tingmannin. Ger hann ikki tað, og tingmaðurin framvegis ikki vil út við nøkrum, so vil skuldsetingin móti løgmanni og løgmansembætinum standa ósvarað. Og tá má hon ikki sleppa.

Løgmaður sigur, at hann skilur ikki, hví skuldseting av hesum slag skal koma beint eftir at somu flokkar hava skrivað undir samgonguskjal og at hesir flokkar hava kunnað verið í stovu saman í fýra ár. Hesum kunnu vit geva honum rætt í. Men løgmaður veit eisini, at hann, sum hevur tosað um samgongu við breiðari uppbakking í fólkinum, kann ikki loyva sær, skal hann liva upp til henda sín setning, at halda fram við eini so smælari samgongu, sum longu frá byrjan er um at fara um tvøran. Hann skyldar Føroya fólki at steðga, meðan gott er, víðka sítt parlamentariska grundarlag, leggja frá sær og lata aðrar royna seg ella skriva út nýval. At halda fram nú sum einki var hent er ein misálitisváttan. Fyrr ella seinni endar aftur galið, tá meirilutin er so tepur og ótryggur. Hinvegin hevur sami løgmaður so tann moralska trupulleika, at hann í hvussu er í fortíðini hevur givið einum av sínum tingmonnum frítt spæl at hegja á samgongufelagar, uttan at tað fekk nakra avleiðing. Ella hevur løgmaðurnú tikið í egnan barm og flokkurin tikið við læru? Og tí ikki kann góðtaka nakran trojanskan hest í samgonguni!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Harmaljóð

Mannbjørn Tausen
fyrrv. formaður í VB

Fyri stuttum hoyrdi eg Steingrím Niclasen í morgunlestri siga, at einki blað hevði livað av bert at bera góð tíðindi.

Kann ikki annað enn geva honum rætt.

Hygg bert eftir Jákup Boga Joensen í Dimmu - hann kundi næstan ikki virka, so spentur var hann at frætta um fleiri trupulleikar í VB. Ein sera løgin háttur at bíða í spenningi eftir teim næstu ringu tíðindunum. Man hann verða líka spentur, um onkur nýggj sjálvsmorðsbumbuatsókn er framd í Jerusalem í morgin - har helst fleiri enn 40 skulu doyggja? Eg spyrji bara. Hetta sigur ikki so lítið um henda tíðindamann. Stoðið á hansara ítróttartíðindaflutningi talar eisini fyri seg - sum maðurin segði - Guð forbarmi seg.

Kann ikki siga annað enn, at tað sló meg fyri bróstið, tá eg las greinirnar hjá ítróttarsnillinginum í Dimmu. Í 5 Dimmum (13/6 - 20/6 - 28/6 - 29/6 - 2/7) viðger hann venjaran, Dragan Kovacevic, uttan eina einastu ferð at tosa við hann. Tað er langt ímillum, ein sær nakað so óseriøst fest á blað. Hann viðgjørdi málið - sum um tað var eitt stórmál - og tosaði bert við onkran ónøgdan (avsettan?) leikara og restin vóru gitingar (ill-!!).

Hví tosaði hann ikki við onkran, ið varðaði av dreingjaliðnum ella unglingaliðnum, so kanska hann hevði funnið útav, at alt ikki var av skriðini til. Onkur hevur tutlað honum í oyra, at í VB er kaos, og góðtrúgvin, sum hann er, beit hann á, og hevur verið krøktur síðani. Viðmerkingar hansara tala fyri seg: "Tað telur rætta vegin, at teir "burturvilstu" eru við aftur (og venjarin farin?)" - "tað hevur gingið spakuliga framá - serliga eftir venjaraskifti" - framá í hvørjum??? Málskjóting??!!. Jú, men....lagið og moralurin er betri á monnum. Ja, lat gá - tað er umráðandi, men.....kanska hæddarpunktið er, tá teir hava tað líka so stuttligt sum í 4. deild. Tað *er* verunliga stuttligt, eg havi verið gjøgnum alla mylluna - og eitt sindur afturat, men er málið ikki at at verða millum 3 tey ovastu liðini??

Tá steypafinalan hjá unglingunum var á Tórsvølli, gekk hann har og hoppaði (altso - Jákup Bogi)- hann gjørdi onga roynd at tosa við Dragan Kovacevic, men dagin eftir stóð at lesa í Dimmu, at Dragan Kovacevic framvegis var venjari VB´s, men nú bert í unglingadeildini. Hetta var tó so spennandi, at hann enn einaferð fór bíða í spenningi eftir næsta leiki. Týsdagin (2/7) komu - vónandi - hansara síðstu viðmerkingar... "Nú er Dragan Kovacevic (endiliga?!!) farin av landinum".

Haldi, at klókskapurin hjá teimum, ið úttala seg - er út av lagi stórur, at teir háða arbeiðið venjarans, soleiðis, at tú sitir eftir við, at hann ongar dygdir hevur, men sjálvandi skal tað negativa fram - hitt nyttar einki. Eg haldi, at Dragan Kovacevic visti okkum øllum, hvussu stóra virðing hann hevði fyri ungdóminum og unglingunum - hann var akkurát vrakaður - at hann var við teimum á Tórsvølli. Bert spell, at tað ikki eydnaðist at vinna finaluna - rómurin hevði sum altíð verið stórur í Vági, men hvussu hevði nevndin og kanska nøkur viðhaldsfólk heiðra venjaran ? - Kanska givið honum eitt herðaklapp í kjallaranum, meðan veitsla var í erva í VB húsinum ? *Kanska kom tapið væl við hjá fleiri.* Veit bert, *at urtin hon følnar og verður ikki drúgv, er rótleysur stelkurin stinni.*

Øll, sum hava verið í VB í áravís, vita, at eitt er at spáa, annað er at ráða, og vit vita eisini, hvussu mong og strong vónbrotini hava verið, men tað er svikalig eydna at geva manni, at hann ikki slapp at siga sína hugsan, áðrenn dómurin fall. Er hetta ikki at ránа sær megi við eitt slag av yvirgangi og vápnamegi ? Í fleiri vikur ynskti Dragan Kovacevic fund við starvsnevndina, har hann skuldi greiða teimum frá, hvørjar ætlanir hann hevði fyri framtíð VB´s - líka frá minipiltum til 1. deild, menn. Men ongantíð komu fundarboðini - ongantíð fekk hann fund við starvsnevndina. Ongin áhugi var at lurta eftir hesum seriøsa manni. Henda mann, sum vit "lokkaðu" til Føroya - til Paradísið Vág, til "serious people and serious club with big ambitions". Hesin skilamaður fekk skomm, skitna løn og fótin í reyvina aftur til Jugoslavia.

Ein situr eftir við einari løgnari kenslu - at slíkar avgerðir kunnu takast bert við luttøku av nøkrum nevndarlimum, og uttan at málið verður viðgjørt. 1. deildar leikararnir hava *ongantíð* biðið um fund við formannin ella við fótbóltsdeild VBs. *Ongantíð*.

Framhald á síðu 11

Hvat er hetta, sum er hent í ár? Hví endaði samstarvið við venjaran, Dragan Kovacevic, so bráðliga - ja, á náttartíð, meðan starvsnevndarlimirnir svóvu? Í mínari verð er tann afturvendandi trupulleikin í VB, at gyrðingin um dunnuhylin er vaksin, heldur enn minkað, sigur Mannbjørn Tausen, fyrrverandi formaður í VB

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktiónin:
tel. 220507
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Framhald av síðu 10

Hvar hava *spælaraumboðini* verið - tað sæst í Dimmu (25/6), at alt hevur koyrt av skriðini til ???? Kanska hevur tað verið ætlanin, at alt skuldi koyrast fast!!!. Heimkomin úr summarfrí, bað formaðurin *(ikki leikararnir)* um fund saman við 1 limi úr starvsnevndini (av 5) og 2 úr fótbóltsnevndini (av 5) við 1. deildarhópin (onskvøldið 19/6), og eftir fundin høvdu hesir somu nevndarlimir fund við spælaraumboðini, og hesir søgdu nú, sjálvt um hetta ikki var til viðgerðar á leikarafundinum, at um ikki venjarin varð koyrdur í stundini, fóru teir ikki til í Klaksvíkar at leika (23/6).!!!!! HVÍ hava leikararnir ikki bíðið um fund, um støðan var so ótolandi? Tað er jú fótbólts- og starvsnevndin, ið skulu viðgera/ loysa trupulleikar.

Nú skuldi ein trú, at nevndin tók málið í størsta álvara. At fáa slíka hóttan krevur, at tú ikki loypir framav. Ongi stórtap høvdu verið, marginalarnir vórðu tíanverri ikki við okkum. *Men gakk.....* kravið var tikið til eftirtektar beinanvegin - uttan at málið varð viðgjørt.

Sjálvur eri eg limur í fótbóltsnevndini, men tað sýnist, at mítt vinalag við venjaran var ein forðing fyri, at eg varð boðsendur at viðgera málið. Eg luttók ikki á fundinum við leikararnar, men avtalað var, at formaðurin skuldi ringja, tá leikararnir fóru. Sjálvt um eg bíðaði til eftir miðnátt, kom fundarboðini ongantíð - og tey eru ikki komin enn. Tveir triðingar av starvsnevndini vóru kunnaðir gjøgnum telefon - Hví var tað so umráðandi hjá nøkrum nevndarlimum at ganga sneisaørindir fyri nakrar leikarar? *Hví skuldi venjarin ofrast á náttartíð????*. Hvat við hansara sjáldsama stóra áhuga og væla arbeiði við unglinga- og dreingjaliðnum ??? Hesin áhugi er kanska ikki sæddur fyrr her hjá okkum. Teir trupulleikar, sum leikarar søgdu seg hava, hví vórðu teir ikki viðgjørdir ?? Hví varð mítt vinalag við venjaran ikki brúkt *positivt*? Hví verður tað skotið mær í skógvarnar í tíð og ótíð, at eg royndi at halda hondina yvir venjaran? *Eg havi aldri, aldri upplivað slíkan óseriøsitet.*

Var eg á fundi, hevði eg aldri gingið við til at ofra venjaran, *uttan at starvsnevndin varð samankallað.* Sjálvandi hevði starvsnevndin tosað við bæði venjaran og leikarar, fyri at royna at komi naggatódnini til lívs. Men gakk....eftir "stuttan" fund - frá uml. 22.00 - 00.30 varð avgerðin tikin.

Fýra (av 5) starvsnevndarlimir vóru als ikki á fundi, men kunnaði gjøgnum telefon .....

eg meini tað!!!!!! Hvussu kundu tey ganga við til hetta? At avhøvda mannin, sum hevði fortreytirnar til eina gylta framtíð? *Vónandi hevur onkur ringan smakk í munninum.....*

Illviljin frá nøkrum hevur borið frukt, og á odda fyri hesum illviljanum gingu onkrir, sum avgjørt áttu at tagt.

Mínir tankar um ungdómsdeildina hava altíð verið høgir, og mín hugsan var (og er): verður tú føroyameistari í 1. deild hjá monnum, hevur tað eina øgiliga ávirkan rundan um teg. Kanska serliga fyrstu ferð og harafturat á eini útoyggj. Hetta hendi fyri okkum í 2000. Árið eftir vann dreingjaliðið FM og harafturat vann 3. lið deildina - bæði í stórum stíli.

Hvat er hetta, sum er hent í ár? Hví endaði samstarvið við Dragan Kovacevic so bráðliga - ja, á náttartíð, meðan starvsnevndarlimirnir svóvu?

Fyri fyrstu ferð eydnaðist okkum at fáa fatur á einum venjara í serflokki eftir okkara mátistokki. Alt sítt lív hevur hann fingist við fótbólt. Hann hevur verið professionellur leikari í 2. deild, síðani hevur hann verið venjari í áravís. Hann hevur hægstu venjaraútbúgving og bert havt góð og frálík úrslit at vísa á. Eisini er 13 ára gamli sonur hansara so evnaligur fótbóltsleikari, at hann leikar á tí jugoslaviska u14 landsliðnum.

Jugoslavia var eisini ein sera framkomin fótbóltstjóð, ið var fyrimynd fyri kanska alla fótbóltsmentan yvirhøvur og Dragan Kovacevic hevur m.a. verið ráðgevi fyri vaksnamanna- og ungdómsvenjarar, so hann er ikki ein og hvør.

Mínir dreymar, um at fáa sett skjøtil á eitt framkomið ungdómsarbeiði, sóu dagsins ljós (hatta við "milliónin til ungdómin", nú varð tað kanska møguligt fyri ein lítlan penga). Longu tíðliga var eg greiður yvir, at hetta var ein framtíðarmaður - *og enn havi eg ikki broytt støðu.*

Men Dragan Kovacevic var her bert fáar vikur, so byrjaði grenjið. Tað vaks meir og meir. Fólk, sum ongantíð hava vant eitt pinkulið, ætlaðu sær at seta dagsskránna..... vit lesa í Dimmu og í leikskráum, at.. "maðurin hevði ikki skil fyri at venja" .... "sigur seg hava 20 ára royndir, tað hava vit onki sæð til "..... " eg havi tosað við hann um, at venjingin er vánalig, men hann lurtar ikki eftir mær (!!!!) - hevur latið evnaríkan leikara sitið á beinkinum"...(løgin viðmerking, tí allir stjørnuspælarar hava sitið har) ..!!!! Nú týsdagin (9/7) var aftur ein viðmerking í Dimmu - " onki skil var á, men hygg nú, nú er spælið nógv betri, (kanka millum linjurnar, *"men vit fáa ongi mál")*" - sanniliga, hvar er broytingin? Tað mugu vera nógvir dystir, hann ikki hevur sæð, og nakrir har hann hevur verið í ringum lag. Ein fær næstan varhugan av, at hetta er fyrsti venjarin, ið VB leikarar hava verið ónøgdir við. Nei, so er als ikki - hetta er bert tann seinasti í røðini. Hvørja ferð úrslitini ikki laga seg, so byrja nakrir at knarra - við hjálp frá ávísum áskoðarum.

Nei, í mínari verð er tann afturvendandi trupulleikin í VB, at gyrðingin um dunnuhylin er vaksin, heldur enn minkað. Ongin "fremmandur" skal koma til Vágs og fáa røring í "hylin", hóast tað í stuttum bert snúi seg um at greiða okkum frá, hvussu ein við smáum broytingum kann fáa úrslit.

Ikki er so løgið, at ein prof. venjari noyðist at tosa um broytingar - meðalaldurin á 1. deildarliðnum nógvar dystir var (er?) omanfyri 30ár (!!), og tað átti ikki at undra nakran, at útskiftingar fara fram. Úrslitini skulu nokk koma - ikki í dag, heldur ikki í morgin, men tey skulu nokk koma. Øll, eisini vágbingar, vita, at neyðugt er at vera dissiplinerður, um tú ynskir úrslit, men her vóru nakrir, ið ikki góðtóku hansara venjingarhátt og høvdu ikki tíð at bíða, og tað fer at kosta VB dýrt - ikki fortíðini, ikki nútíðini, men í framtíðini, at nakrir nevndarlimir hava sparkað alla menning skeivan veg. Sjálvur havi eg ikki gloymt 1981 og 1982, tá vit endaðu í 3. deild. Tað tykist ikki, sum vit hava lært nakað av tí, sum hendi tá. Nei og aftur nei, tí í VB og rundan um VB eru ov nógv - "je veit alt".

Má eisini venda aftur til Jóansøkurøðu mína ár 2000, har eg millum annað var inni á, at tíðin vit liva í er eins og áarstreymur - hann ber alt við sær - bæði líkt og ólíkt. Tað ræður um at taka tað, sum virði er í og sum kann verða stuðul á framburðsleið, men eisini ræður um at lata tað skaðiliga liggja, so tað rekur viðari - og tekur eingin tað upp, so vil tað at enda rotna og søkka og tá hevur tað fingið sítt verunliga pláss. Tað eru fólk, sum kunnu kveikja og slóa fyri, ið vit hava brúk fyri til framtíðina - her hugsi eg um ungdómin - tey spegla sær í tí viðurkenning og eldhuga, sum tann vaksni sýnir felagnum - tey mynda ungdómsins mynd av sær sjálvum og geva honum eina trygga kenslu av at vera virðismikil. Hetta gevur sjálvsvirðið og er sum eitt akker, tá brotasjógvarnir koma. Slík ítróttarfólk fært tú bert alt upp, um tey kunnu ímynda sær tey positivu - við "visiónum" og ikki tey *illviljaðu, ið bert hugsa um seg sjálvan - forlanga lítið av sær sjálvum, men málrættað klára at krógva seg aftanfyri sína ómegd.*

Tað harmar meg ómetaliga nógv, at hesi orð eru fest á blað, men enn harmari eri eg um viðferðina, Dragan Kovacevic fekk, men tað, sum harmar meg allarmest, er, at okkara undómsarbeiði hevur fingið eitt øgiligt skot fyri bógvin. Eg eri bangin fyri, at her eru ov nógv fólk, sum halda, at gott arbeiði og góð úrslit koma av sær sjálvum. Nú hevur so onkur av hesum møguleika at sýna nakað og roknað verður við, at hesi, sum krevja nógv av øðrum, megna at krevja eitt lítið sindur av sær sjálvum.

Lívið er so margfalt og spinnur so mangar træðrir við ymiskum litum, hvør av hesum ber sín dám. LIVST SO SPYRST.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

Dramaið á Sundsvegnum

Christian M. Poulsen

Síggi, Hendrik Rubeksen, varapolitikomiserur úttalar seg og sigur: "At tá fólk hótta við vápnum, er jú at avbyrgja økið, vinna "position", vera trygt ílatin og søkja skjól bæði fyri politistum og sivilfólki.

Tað einasta, ið er verðuleiki í hesum førunum, er at politistarnir(báðir) søktu sær skjól -restin er tvætt; men tað, sum fær meg til pennin, er sivil-fólkið. Hvar er trygd borgaranna?

Stóð sjálvur á "fyrstu parkett", í einum 9m høgum stiga og málaði vindskeiðir. Tá fyrsta skotið small, var eg skjótur úr stiganum, tí eg visti, at børnini, sum vóru og vitjaðu, mangan súkkla niðan eftir Sundsvegnum. Fekk so kísta tey innar og lænti ein kikara í húsinum. Visti ikki fyrst, um tað var rifla ella byrsa. Hugsið tykkum til, um tað var rifla! Maðurin var klárt ikki í hesari verð. At síggja báðar løgreglumenninar við lontum kikara frá onkrum granna aka eftir reyv omaneftir Sundsvegnum, var ikki bara pínligt, men tá hugsaði tú: "Um maðurin leggur leiðina niðan ímóti børnunum?"

Væl veit eg, at útvarpið segði, at Klein hevði "kekk" á tí heila via fastnet og fartlf., og at løgreglumenn hava fastar(psykologiskar) mannagongdir at halda seg til. Men tað, sum Klein og Lávus og Klávus als ikki høvdu "kekk" á, var at ein maður við byrsu gekk á alfara vegi og hótti við at skjóta. Møguligt er eisini, at tit "debriefa" hvønn annan aftaná vandastøður av ymiskum sløgum, men álvara tos, at liggja við Walkie Talkie og kikara og spæla "røvara og politi", er so óluksáliga langt frá nøktandi vernd borgaranna. Spurningurin er so: "Hvat eru tit lærdir til?".

Aftaná maðurin sat í hondjørnum, lat eg børnini fara út aftur at spæla og kleiv so upp aftur í stigan.

Bygdarstevna í Samba um vikuskiftið

Veðrið hevur ikki sett dám á summarið, verður sagt, men tað hava stevnurnar hinvegin. Um vikuskiftið verður stevna í Samba. Millum annað bresta norður og suður saman í stevnudysti millum Oldboyslið

STEVNUR
Dagfinn Olsen

Í Samba verður skipað fyri bygdastevnu um vikuskiftið. Longu hóskvøldið verður lagt fyri við góðum stevnubingo. Fríggjadagin klokkan 19:00 bresta norður og suður saman í stevnudysti millum Oldboyslið hjá Samba/VB og TB/Royn. Klokkan 21:00 er barnadiskotek.

Leygardagin klokkan 13:00 setur Trúgvi Thomsen stevnuna og fótbóltur og tivoli er á skránni klokkan 14:00. Eisini er neytamykjukapping klokkan 18:00, plettskot og brotsspark fyri børn og miðnáttarsangur, har Hergeir Nielsen heldur røðu. Sumbiar Dansifelag fer eisini at kvøða. Klokkan eitt er dansur, har Ein Blanding spælir.

Stevnan endar sunnudagin, har millum annað møti og tivoli stendur á skránni.